# Mugu bara vóna

**Hóast VÍF enn kann røkka gullinum, so krevur hetta nú eina hjálpandi hond**

HONDBÓLTSPRÁT
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Áki G. Olsen var sum vera man vónbrotin eftir dystin móti Neistanum sunnudagin. VÍF hevði undan dystinum strítt seg upp til eitt pláss í oddinum, men longu fyrstu løtuna av dystinum stóð greitt, at hetta neyvan fór at halda.

Neistin legði fyri sum eitt óløgi. Vóru tit ikki klárir til dystin ella hvussu?

– Teir vóru í øllum førum meira klárir. Tað er so heilt víst. Og eg haldi eisini, at vit gjørdust eitt sindur bilsnir um, at teir løgdu so harðliga fyri, helt Áki, tá vit eftir dystin fingu orðið á hann.

Men tit fáa tó strítt tykkum aftur í dystin eina løtu, áðrenn tit aftur missa takið. Fóru tit niður við høvdinum ella hvussu?

– Vit brenna fyrst og fremst ov nógv. Serliga byrjanina av seinna hálvleiki hava vit annars gott tak á teimum, men tá vit ikki skora, sleppa teir aftur avstað, og so haldi eg, at vit fara niður við høvdinum eina løtu. Vit megna tó partvíst at stríða okkum aftur í dystin, men tað var ov seint.

### Bíða eftir gávuni

Og nú bert tvey umfør resta av kappingini, mundi hetta vera eitt tap, sum tók fast hjá VÍF. Í øllum førum er liðið nú aftur í teirri støðu, at teir ikki sjálvir kunnu gera av, hvar teir enda. Og hóast teir enn eiga ein trumf í góða málmuninum, so tóktist meistaraheitið ikki vera nakað, sum leikararnir hugsaðu um eftir vónbrotið sunnudagin.

– Vit hava so mist góðu støðuna, sum vit høvdu undan dystinum. Sjálvandi kunnu vit vóna, at vit enn einaferð fáa onkra gávu frá hinum liðunum. Men skal eg vera heilt erligur, so er tað ikki nakað, sum eg rokni við í løtuni, staðfesti Áki G. Olsen at enda.




*Tað var ein vónbrotin Áki G. Olsen, sum eftir dystin kundi staðfesta, at nú hevur VÍF ikki longur lagnuna í egnum hondum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Við Karl Oddmari aftur sum primus-motor í verjuni, eydnaðist Neistanum at vinna ein sannførandi sigur á VÍF, og harvið mugu teir bláu nú taka við favoritt-heitinum til FM-gullið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

VÍF-Neistin 21-28 (9-14):

# Blá minni um 2000

**Favoritturin til FM-gullið má nú eita Neistin. Ein knúsandi sjey mála sigur í Vestmanna leggur nú upp til rættiligt gullbrak móti Kyndli komandi vikuskifti**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Neistin hevur sett kós móti gullmerkjunum í FM-stríðnum.

Øðrvísi fær niðurstøðan neyvan verið, eftir at bláa havnarfelagið sunnudagin vann ein knúsandi sigur á VÍF. Sjey mál vóru á muni, og somikið trygt hava neistamenninir ikki vunnið í Vestmanna síðani seinasta umfar í 2000, tá liðið við Áka Olsen og Heina Hanusarson sum stóru profilunum gjørdist føroyameistari fyri fyrstu ferð síðani 1978.

### Buldur og brak

Og í ávísan mun vakti spælið sunnudagin eisini minnir um kraftmikla spælið frá meistaraárinum.

Ferð og megi var á spælinum frá fyrsta bríksli, og flestu vestmenningarnir í høllini mundu gruna ilt, tá tað longu eftir fyrstu 40 sekundini stóð 0-2 á máltalvuni. Ikki tí tað í sjálvum sær er nøkur ræðandi støða í einum hondbóltsdysti á 60 minuttir, men meira mátin, sum hetta hendi uppá.

Dragisa Stojovic, sum ofta hevur lyndi til at brenna eins nógv, sum hann skorar, tóktist als ikki vera til at steðga. Uppspælið gekk kvikliga fram við verjuni, og tá so stóri 9’arin fór uppfrá, tóktist guli verjugarðurin als ikki til reiðar at fygja honum.

Ein lítil vend kom tó í, tá støðan vísti 2-6. Neistin hevði møguleikan at økja, men tá Blagoje Buha misnýtti brotskast, og VÍF skoraði við mótálopi, kom lív í høllina. Trý VÍF-mál afturat skaptu javnvág í, men tað var alla tíðina, sum hevði Neistin yvirtakið. Eins og í eini kappkoyring millum ein hálvdýran Ford og so ein Ferrari. Tað kann væl vera, at Ford’urin er ein góður bilur, men italska flaggskipið hevur gjarna nakað nógv fleiri hestar og cylindarar at koyra uppá, og soleiðis var eisini við Neistanum.

Við framúr verju- og málverjaspælið steðgaðu teir málskjótingini frá vestmenningunum, og spakuliga fóru teir aftur at toga frá. Og nú komu málini úr øllum ættum. VÍF var annars so smátt um at fanga Dragisa, men tað skapti rúmd fyri øðrum leikarum, og í mun til fleiri aðrar dystir í ár, so dugdi Neistin nú eisini at gera sær dælt av hesum. Og tað var nú aftur sjónligt, hvør kanska størsti trupulleikin hjá VÍF er. Spælið gongur snøgt sagt ov seint fyri seg. Skotstyrkini bilar einki, men tá mótstøðuverjurnar eru væl skipaðar, megnar liðið í alt ov lítlan mun at spæla tunt, og tí endaðu álopini ofta við ov tunnum royndum av veinginum, ella gjørdist talan eisini um skotroyndir frá leikarum, sum vóru undir stórum trýsti, og sum tí ikki gerast so trupul hjá málverjanum, sum tær helst skulu vera, um nakað munagott skal spyrjar burturúr.

Tað hóvaði heldur ikki heimaliðnum serliga væl, at dómararnir konsekvent vístu tveir fingrar, tá togað varð í troyggjuna, og við fleiri yvirtalsstøðum á rað megnaði Neistin veruliga at rykkja. 8-9 broyttist til 9-12, og tá Áki Mørk so við tveimum góðum málum setti punktum fyri hálvleikinum, stóð greitt, at VÍF nú hevði eitt heilt fjall av mótbrekku undan seinastu 30 minuttunum.

### Tungt í brattlendi

Vestmanna er soleiðis lagað, at brattlendið er ein partur av gerandisdegnum, og fyrstu løtuna eftir stegðin tóktist tað eisini so, at VÍF ætlaði at vinna á hesum.

Fyrst og fremst fingu teir nú verjuna at koyra, soleiðis at Neistin at kalla ikki kom ígjøgnum, men í hinum endanum stóð tó einki til. Fyrst og fremst orskað av livandi múrinum í Neista-málinum, har Zeljko Jotic helst man vera sterkur kandidatur til heitið sum ársins málverji, og tá Neistin so aftur eksploderaði, skrædnaði av álvara. Heini Hanusarson hevði fram til tá annars gjørt mest um seg við framúr verjuspælið, har hann til fulnar gjørdi nýtslu av góða fysikkinum, og nú fór hann so eisini í holt við málskjótingina, sum hann aloftast verður settur í samband við. Dragisa var skjótur at taka táttin upp eftir liðfelagan.

Eitt korter fyri leiklok vóru tíggju mál á muni. VÍF hevði fram til hetta skotið ellivu mál, og megnaði Neistin bara at halda sama talinum seinastu fimtan minuttirnar, so var dysturin at kalla vunnin.

Ein lítla løtu megnaðu vestmenningarnir tó at skap ein farra av spenningi í aftur. Við mansverju av Dragisa og Heina fingu teir forða vandamestu Neistamonnunum, og við fýra málum innan eins nógvar minuttir tóktist kósin vera rættað nakað.

Men tað var ikki stórt øðrvísi enn kenslan, tá tú undir einum køldum fjalltúri pissar í buksurnar til tess at fáa hitan. Neistin fekk aftur glið á, tað spælið varð umskipað nakað, og tá VÍF síðani sleptu mansverjuni, var leyst og liðugt. Uttan stórvegis hóvasták kundi nýggja oddaliðið koyra sigurin heim, og tá blá/hvítu áskoðararnir í bláum búnum fóru marsjerandi kring vøllin í sonnum sigursrúsi, var eingin, sum mutaði ímóti. Bíðað varð bert eftir seinasta floytinum úr klokkuni kortini.

### Ein gáva skal til

Nú bert tvey umfør resta at leika, er einki at ivast í, at sigurin hjá Neistanum staðfesti, at teir nú eru fremsti avbjóðarin til FM-gullið. Ikki bara grundað á sigurin, men serliga á mátan, sum hann varð vunnin uppá.

Megnar liðið at halda dampinum eins høgt uppi í teimum báðum seinastu dystunum móti Kyndli og H71, er ilt at ímynda sær, hvussu hesi skulu steðga stigasavningini. Ikki minst tí talan eisini var um eitt veruligt heildaravrik, har bæði álops- og verjuspæl var av høgum klassa, og har málverjin so sanniliga eisini fylgdi við, tá tørvurin á hesum var størstur.

Hjá VÍF er spælið tó ikki heilt liðugt. Góði málmunurin kann í øllum førum framvegis gerast tann trumfurin, sum kann geva avgerandi fyrimunin.

Men teir kunnu so ikki longur sjálvir gera av, hvørt hetta verður støðan. Fyrst og fremst krevst, at Neistin tapir annan av teimum báðum seinastu dystunum, samstundis sum VÍF vinnur sínar. VÍF hevur fleiri ferðir í ár fingið gávur av ymsum slag, og tó at lagið hjá stóru áskoðarafjøldini var í botni sunnudagin, so hava gávurnar til VÍF verið nógvar og stórar í ár, og kanska tann størsta enn er eftir í posanum.

### Dysturin í tølum

**VÍF-Neistin 21-28 (9-14)**
**Málskjúttar**
**VÍF:** John Zachariassen 7, Sámal Joensen 4, Daniel Rápa 3, Áki G. Olsen 3, Ingi Olsen 2, Petur Frank Joensen 1, Johnny Joensen 1
**Neistin:** Dragisa Stojovic 8, Áki Mørk 5(1), Helgi Justinussen 3, Heini Hanusarson 3, Blagoje Buha 2(1), Karl Oddmar Rasmussen 2, Helgi Michelsen 1
**Brotskøst:** VÍF 1, Neistin 7
**Útvísingar:** VÍF 6, Neistin 1
**Dómarar úr Kyndli:** Hannis Wardum & Uni Wardum. Hildu eina greiða linju gjøgnum allan dystin, og ikki minst í seinna hálvleiki gav hetta eisini úrslit í munandi betri disciplini í spælinum á vøllinum.

# Kompakt

**Neista-málverjin var sera fegin um verjuspælið hjá Neistanum sunnudagin, og sum heild tóktist hann eisini væl nøgdur um úrslitið**

HONDBÓLTSPRÁT
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sammett við tepra -og hepna - sigurin á StÍF fyri viku síðani, var tað fyrst og fremst verjan, sum var stóri munurin hjá Neistanum sunnudagin. Ein verja, sum stríddist móti hvørjum tí einasta mótstøðuálopi, og sum alla tíðina tóktist somikið væl skipað, at tungt spælandi vestmenningarnir ikki høvdu møguleika at bróta seg ígjøgnum hana.

Eftir dystin fingu vit orðið á Neista-málverjan, Zeljko Jotic ella Jota, sum hann vanliga verður róptur, og hann var eisini skjótur at staðfesta, at hetta hevði verið honum ein stór hjálp í dystinum.

– Fyrst og fremst, so megna vit í dag at halda verjuni kompaktari. Tá leikararnir alla tíðina flyta seg sum ein blokkur, so verður tað at kalla ógjørligt hjá hinum at spæla seg ígjøgnum, og tað er sjálvandi ein stór hjálp frá mær, tá skotini í stóran mun koma úti frá. Tú sært í dag, at Ingi og Sámal fáa sjey mál samanlagt, og tað er altso ikki serliga nógv, um sammett verður við aðrar dystir, sigur Jota.

Og týdningurin av slíkum verjuspælið er kanska størstur, tá talan er um eitt lið við slíkum skjúttum, sum hjá VÍF?

– Nei. Tað er altíð líka týdningarmikið. Líka mikið um talan er um stórar ella lítlar menn, so má verjan verða kompakt. Um ikki, so sleppa leikararnir heilt inn at skjóta, og so er ikki nógv at gera hjá einum málverja.

– Hartil megna vit eisini at spæla ein fornuftigan dyst í álopinum í dag. Vit tveita ikki óneyðuga bóltar burtur, soleiðis at VÍF kann fara í kontra. Nakað sum kanska hevur verið størsta styrkin hjá VÍF hesa seinastu tíðina. Tað sleppa teir ikki í dag, og tað var kanska eisini ein av stóru orsøkunum til sigurin, heldur Jota, sum samstundis gloymir at nevna, at tað var gott málmansspæl so sanniliga eisini.



*Ein kompakt verja er altíð týdningarmikil. Líka mikið um talan er um stórar ella lítlar menn, heldur Neista-málverjin, sum nú tykist hava góðar møguleikar til sítt fyrsta FM-heiti*

*Mynd: Álvur Haraldsen*